## DAGSINS MEINING

# Enn ein succes

Vit hildu ikki, at orðabókin hevði nakað orð fyri úrslitinum av Summarfestivalinum i Klaksvík, men vit hugdu kortini. Jú, mín sann um ikki Hjalmarsbók hevur orðið succes. Tískil kunnu vit við góðari samvitsku loyva okkum at nýta heitið ein dundrandi succes um Summarfestival 2005. Festivalurin savnaði meira enn 8000 áhoyrarar og hetta man uttan iva vera føroyskt met. Fyrireikararnir kunnu vera væl nøgdir og tað sást á øllum brøgdum, at á hoyrarnir vóru sera væl nøgdir. Hetta høvdu áhoyrarnir eisini allar orsøkir til, tí fyrireikararnir høvdu megnað at leggja eina heilt óvanliga flotta skrá fyri festivalin.

Tað er einki minni enn eitt bragd, at kunna seta saman eina skrá sum hana á Summarfestivalinum 2005. Her vóru heimsnøvn sum Brian McFadden, Shakin´Stevens, Anne Linnet, Ana Johnson og Ola Nordskar. Her vóru tey bestu av okkara egnu so t.d. Týr, Straight Ahead, Dynamitt, Lawetz, The Dreams, Eyðun og Terji, Brandur, I am, Poppkorn og Black N´Wite Crew - ein ørgynna av framúrskarandi rútmiskum bólkum og einstaklingum. Áhoyrarnir hava fingið eina uppliving fyri lívið og festivalurin gjørdist ein tónlistalig uppliving av teimum stóru.

Festivalarnir eru nú komnir fyri at vera. Hvør festivalur hevur funnið sín form og sína áhoyrarafjøld. Konseptini ella myndlarnir eru ymiskir og hvørt konseptið hevur sín stóra týdning. Tann myndil, ið fyrireikararnir av Summarfestivalinum hava valt, vendir sær til ein sera breiðan áhoyraraskara. Hesin myndil hevur nakað til øll - til børn og ung, til foreldur og øll ættarlið. Soleiðis gerast Summarfestivalurin til nakað, sum øll kunnu fara til og hann verður sostatt ein hending, sum øll kunnu njóta í felag. Tað eru allar orsøkir til at ynskja fyrireikarunum tillukku við einum sera stórfingnum tiltaki og eini treytaleysari succes. Alt var fingið frá hondini skjótt og væl og alt gekk sum tað skuldi. Hetta var jú eitt ómetaliga stórt tiltak og setti tí sera stór krøv til fyrireikararnar og til lokalsamfelagið. Undirtøkan í lokalsamfelagnum at stuðla Summarfestivalinum hevur verið stór og høvuðsstuðulin, Norðoya Sparikassi eins væl og hinir sponsorarnir hava veruliga við at stuðla Summarfestikvalinum rakt seymin á høvdið. Nú gleða vit okkum til næsta Summarfestival.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Raplar nú av álvara fyri Høgna Hoydal?

**Edmund Joensen**



Høgni Hoydal fer lætt um sannleikan, sum hann er vanur. Hann sigur orðarætt um hækkanina av løgtingsmannalønunum: »Tá atkvøtt varð í tinginum, vóru fólk fyri og ímóti í øllum flokkum«. Hansara útlegging er, at Sambandsflokkurin og eg samtyktu løgtingsmannalønirnar í 1999. Hetta var meðan fullveldislandstýrið ráddi fyri borgum.

Sannleikin er, at ongin í Sambandsflokkinum atkvøddi fyri hesum uppskotinum í Tinginum. Tað stendur svart upp á hvítt í løgtingsmálið nr 73. Hvussu kann Høgni Hoydal fáa seg at siga slíkt uttan at blunka, og samstundis vísa til løgtingsmálið, sum sigur beint tað øvugta?

Niðanfyri er eitt stutt yvirlit, um lutin hjá Sambandsflokkinum í tingmálinum.

**Løgtingsmál nr.73 avrit av atkvøðugreiðsluni**

16 feb. 1999 samtykti Tingið løgtingsmannalønirnar endaliga við 18 atkvøðum fyri, 7 ímóti og 7 vóru blankar. Flemming Mikkelsen, Marjus Dam, Alfred Olsen, Lisbeth Petersen og Edmund Joensen atkvøddu nei. Heðin Mortensen atkvøddi blankt.

**Fyrra álitið**

Tvær tingnevndir (fíggjarnevndin og ein grein 25 nevnd) skrivaðu álit í málinum. Í tí fyrra álitinum frá Sambandslokkinum søgdu fíggjarnevndarlimirnir Lisbeth Petersen og Flemming Mikkelsen: »Minnilutin (Lisbeth Petersen og Flemming Mikkelsen) heldur, at tað er ikki rætt at loyva uppskotinum ígjøgnum, nú vit hava grundleggjandi samfelagsbroytingar fyri framman, og tekur ikki undir við uppskotinum, sum umstøðurnar eru.«

**Seinna álitið**

Í seinna álitinum frá Sambandsflokkinum søgdu umboðini í grein 25 nevndini: »Minniluti 2 (Edmund Joensen og Alfred Olsen) vísir til tað, umboð Sambandsfloksins í fíggjarnevndini, Lisbeth L. Petersen og Flemming Mikkelsen, hava ført fram í áliti 1, og setir einki uppskot fram.«

Her hava vit so álit og endaliga atkvøðuúrslitið svart upp á hvítt, sama hvat í Høgni Hoydal finnur upp á at siga og halda. Ongin í Sambandsflokkinum atkvøddi fyri.

**Hvat verður tað næsta?**

Hvat verður tað næsta hann finnur uppá fyri at fáa medieumtalu? Hesufer skuldsetur hann løgtingsformannin fyri at siga ósatt. Hann smæddist ikki fyri at leggja lamið sjálvt Løgtingið, tá ið yvirtøkulógin skuldi samtykkjast. Drotningin kundi heldur ikki siga nøkur orð við ein døgurða í Norðurlandahúsinum, uttan at alt skuldi verða á gosi. Á fólkatingi fúka fyrispurningarnir um oyruni á donskum ministarum, um hvør hevur skrivað hvat í taluni, Drotningin helt. Og hann hevði neyvan sæð nýggja ríkisumboðsmannin, áðrenn hann fekk fyrstu 7 politisku spurningarnar at svara uppá.

**Nú raplar fyri honum**

Sætt at siga, havi eg havt ein pinka lítlan mistanka um, at tað var Høgni Hoydal sjálvur, sum hevði ein fingur við í spælinum, nú útspillandi greinarnar í bløðunum ikki hava trotið. Taktikkurin er hin sami: Koyr uppá tignina, tað er besti máti fyri at geva honum skot fyri bógvin. Ber ikki á mál við sjálvum innhaldinum í greinum, so brúka okkurt annað, stavivillur til dømis.

**Henda seinasta**

Henda seinasta skuldsetingin sannførir meg endaliga. Skal bara siga frá, at eg eri sera glað6ur fyri at hava fingið hann undan vaðingini (út úr buskinum) og gleði meg til tann rætta opna beinleiðis dystin, sum eg rokni við, nú byrjar av álvara.

# Flot service fra ATLANTIC AIRWAYS

**Anita Poulsen og Iva Poulsen**
*Vágur*

Da vi den 7. juli skulle fra Suderø til København for videre at komme på ferie, var vi så uheldige, at Smyril strejkede. Så vi kunne ikke komme fra Suderø. Det var et stort problem for os, da vores rejse syd på ville gå tabt. Efter at have sat himmel og jord i bevægelse og en god portion panik, greb Atlantic Airways ind og hjalp os uden betaling fra Suderø til lufthavnen i helekopter. Det kalder jeg service. Vi kom på vores ferie. En stor TAK til Atlantic Airways.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.